

*Í USA vórðu átrúnaður og fólkastýri sundurskild í 1776. Í Danmark vórðu tey við grundlógini í 1849 samanblandað. Í Føroyum eru tinglimir og prestar javnsettir á tjóðarhátíðini, tá tingið verður sett*

MYND: JENS KRISTIAN VANG

gjalda kirkjuskatt, hóast hesin skattur hvørt ár kostar teimum okkurt um eina ferð suðureftir. Hetta kemst av, at fólk hóast alt fegnast um kirkjuna, tí í svárum og meiningsleysum stundum er hon altíð til reiðar at bjóða fólki á gátt.

John Lennon skrivaði í einum sangi í 1970, at Gud er eitt hugtak, sum vit máta okkara líðing eftir. Er ongin líðing, er hugtakið fjart fyri okkum. Er líðingin nógv, fyllir hugtakið nógv í okkum. Útsagnirnar í orðaskiftinum mánakvøldið um kristindómin minna nógv um hesa niðurstøðu. Okkum tørvar kirkjuna, um so illa skal vilja til, at vit missa fótafestið ella ikki skilja meiningsloysið í okkara tilveru. Haraftrat varð víst á, at kirkjan mentanarliga og søguliga er djúpt rótfest í skandinavisku samfeløgunum. Hon hevur havt stóran týdning fyri sálarlívið hjá fólki í samfull 1000 ár.

## Trúgvandi føroyingar

Júst hesin veruleikin man ikki minst gera seg galdandi fyri føroyska samfelagið. Í Føroyum minnir støðan hjá kirkjuni nógv um støðuna hjá kirkjuni í grannalondunum. Hon er eitt gamalt hús, sum altíð hevur verið har, og vanliga geva flestu fólk henni ikki so nógv gætur. Men tá til skarpskeringar kemur í sambandi við dóp, konfirmatión, hjúnarvígslur, deyða og høgtíðir, er kirkjan brádliga miðdepilin. Um tað er tí, at fólk trúgva øllum, sum sagt verður í kirkjuni, ella tí kirkjan mentanarliga og søguliga altíð hevur tikið sær av hesum viðurskiftum, veit hvør einstakur best at svara.

Í útvarpssending varð herfyri víst til ritgerð, sum Janna Egholm Hansen hevði gjørt um átrúnað í Føroyum, og har niðurstøðan var, at Føroyar eru munandi minni sekulariserað samfelag enn eitt nú danska samfelagið. Meðan 2 prosent ganga í kirkju og á møti fast í Danmark og Svøríki, er talið 25 prosent í Føroyum. Hetta vísir greitt, at átrúnaðurin hevur sterka støðu í Føroyum, og at bondini millum fólk gjøgnum átrúnaðin eisini eru sterk. Hví hetta er so, kann so verða kjakast um, men ein grund er ivaleyst, at Føroyar eru fjarskotið oyggjaland.

Sum fjarskotið oyggjaland eru vit í fyrsta lagi avbyrgd frá øðrum. Í øðrum lagi eru vit umgyrd av havi, og veðrið er sera skiftandi. Í triðja lagi hava vit søguliga verið noydd at lívbjargað okkum á uppøsta havinum og í bróttu bjørgunum. Vandarnir har vóru mangan so stórir og óskiljandi, at fólkið varð noytt at leggja lívsins gongd í hendurnar á Várharra. Onki menniskja megnaði at gera umstøðurnar tryggar, og størsti uggin gjørdist bønin.

> **Gud er eitt hugtak, sum vit máta okkara líðing eftir. Er ongin líðing, er hugtakið fjart fyri okkum. Er líðingin nógv, fyllir hugtakið nógv í okkum**

## Føroyar sum undantak

Janna Egholm Hansen vísti á, at leingi hevur Evropa verið mett sum normurin í heiminum, tá um gransking í sekularisering ræður. So hvørt sum evropeisku samfeløgini vórðu nýmótansgjørd, misti átrúnaðurin sín týdning og gjørdist minni sjónligur. Gransking í dag hevur tó ikki Evropa sum norm viðvíkjandi sekularisering í heiminum. Evropa verður tvørturímóti mett sum undantakið, tí bæði í Miðeystri, USA og Fjareystri eru samfeløgini munandi meira átrúnaðarlig enn í Evropa.

Føroyar eru so undantakið í sekulariseraða Evropa. Evropeiska sekulariseringin hevur ongantíð rættiliga fingið fastatøkur heima hjá okkum, og tí minnir føroyska samfelagið nógv meira um USA og onnur átrúnaðarlig lond enn eitt nú Danmark. Útboðið av samkomum í Føroyum er stórt, hóast vit hava havt eina statskirkju, ið hevur fingið sín skatt frá fólkinum. Janna Egholm Hansen nevnir í grein á www.videnskab.dk, at umframt harðbalnu umstøðurnar í Føroyum kunnu seinkaður modernitetur og málsliga stríðið í kirkjuni hava elvt til stóra útboðið av samkomum. Fólk gjørdust kreativ og skaptu tíðliga sín egna, fjølbroytta kristindóm uttan fyri dansktmæltu kirkjuna.

Yvirskipað hava føroyingar ongantíð samtykt nakra grundlóg eins og amerikanarar, danskarar og mong onnur. Í Føroyum hava vit tí ongantíð tikið fólkaræðiliga støðu til, hvussu tætt átrúnaður og fólkastýri skulu hanga saman. Men í uppskotinum um nýggja føroyska stjórnarskipan stendur, at í Føroyum hevur kirkjan søguliga havt serstøðu í Føroyum, og tað skal hon framhaldandi hava, tó at hendan áseting ikki má gera seg inn aðrar fatanir. Haraftrat verður staðfest, at vit skulu hava trúarfrælsi, tvs. rætt til als ikki at vera kristin, men trúgva tí, vit hava hug til.